52-047/2019

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

Løgtingið

Svar
uppá

skrivligan fyrispurning nr. 47/2019 eftir tingskipanini § 52a til Bárð á Steig Nielsen, løgmann, frá Beintu Løwe Jacobsen, løgtingsmanni, um skjøl í sambandi við fullveldis-samráðingarnar

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Nær fer løgmaður at almannakunngera øll skjøl, undir hesum eisini fundarfrágreiðingar, í sambandi við sonevndu fullveldissamráðingarnar millum landsstýrið og donsku stjórnina í árinum 2000?

2. Um løgmaður ikki ætlar at almannakunngera skjølini og fundarfrágreiðingarnar frá fullveldisamráðingunum, hvør er so orsøkin, og hvørjar eru grundgevingarnar fyri hesum?

3. Eru fullveldissamráðingarnar framvegis í gongd, sum annars hevur verið ein grundgeving fyri ikki at lata innlit í skjølini?

Svar:

Til spurning 1, 2 og 3.

Tað er ikki vanligt, at løgmaður av sínum eintingum almannakunnger skjøl úr stóru skjalagoymsluni í Tinganesi. Hinvegin kunnu umsøkjarar eftir áheitan fáa atgongd til skjølini eftir reglunum í innlitslógini.

Seinastu 20 árini hava fleiri umsóknir verið um innlit í "fullveldismálið", sum umsøkjarnir vanliga kalla tað. Løgmansskrivstovan hevur svarað, at tá ið fullveldismálini eru so sera nógv í tali, er neyðugt hjá umsøkjaranum at koma við einari neyvari umbøn, har tað er nágreinað, hvørji skjøl í rúgvismikla journalyvirlitinum, umsøkjarin vil hava hendur á. Hyggja vit burtur frá nógv umroddu fundarfrágreiðingunum, hevur eingin umsøkjari nakrantíð søkt um innlit í ítøkiligt skjal, og tí hevur Løgmansskrivstovan ongantíð viðgjørt nakra ítøkiliga umbøn eftir reglunum í innlitslógini.

Nógv umroddu fundarfrásagnirnar hava sína egnu sogu.

Umsøkjari hevur ikki rættarkrav uppá innlit, og higartil hava mínir undanmenn í løgmansembætinum noktað at givið meirinnlit í fundarfrágreiðingarnar.

Tinganes · FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tel. +298 306000 · Fax +298 306015 · info@tinganes.fo · www.tinganes.fo

Eg ætli nú at geva meirinnlit í fundarfrágreiðingarnar í sambandi við fullveldissamráðingarnar millum landsstýrið og donsku stjórnina í árinum 2000.

Tað kemst av, at eg haldi, at tá ið 20 ár eru liðin síðani seinasta fund í fullveldissamráðingunum, ber til av rottum at siga, at fullveldissamráðingarnar eru lidnar. Eisini eri eg av teirri sannfæring, at tá ið ein fyrrverandi embætismaður á heysti í 2016 gav eina bók út, har trúnaðarupplýsingar í hópatali vórðu almannakunngjordar, so hevur hvor einstakur føroyingur krav uppá sjálv/ur at fáa moguleikan at lesa skjolini og taka stoðu til tey á egnum grundarlagi.

Í Tinganesi, 30. januar 2020

Bárður á Steig Nielsen
logmaður